





hjá Kára Svensson eru ikki leingi í málistovuni ella framsýningarhølunum, fyrr enn tey verða seld og móttikin.” (s.14). Víðari greiðir hon frá hvussu Svensson spakuliga nærkaðist listini til hann í 1993 kundi gera listina til sítt lívsstarv. Menningin í hansara verki verður lýst sum klingrut, heldur enn reglurøtt, tengd at ringrás árstíðarinnar: “..hansara list snýr seg ikki bara um náttúruíblástur, men ofta um eina stilla tilverudimensjón. Haraftrat kemur gleðin í tí at mála. Stutt og greitt. Ikki er neyðugt við so nógvum fínum og útgreinandi orðum.” (s.10). Myndatilfarið avdúkar, at Kári Svensson øll árini hevur verið sera opin fyri inspiratiónskeldum frá føroyskum fyrimyndum sum Hans í Mikladali, Zachariasi Heinesen, Astri Luihn til norðurlendskar fyrimyndir sum t.d. Kjeld Nupen og Per Kirkeby.



## Lekrir litir

Myndirnar, sum hanga í forhøllini líkjast teimum trýbýttu, vertikalu kompositiónunum sum Kári Svensson fekst við í 90´unum við týðiligari inspiratión frá Ingálvi av Reyni. Flestu myndirnar, sum hanga inni í salinum eru bygdar upp av fleiri horisontalum ella vertikalum lindum, ið tilsamans mynda eitt abstrakt landslag í lekrum, dekorativum litsamansetingum av t.d. ráhvítum, lilla og turkis og pink ella orange. Oman á lindunum sæst eitt nú malargrót, ella menniskjaskap, ella skabelónkendir fuglar, sum sveima á skák eftir myndaflatanum. Onkur av hesum myndum minnir innihaldsliga um Mikines og mynd hansara “Vetrarmorgun” (1958), meðan grunni og effektjagstrandi málihátturin minnir meira um myndirnar hjá áðurnevndu listakvinnuni, Astri Luihn. Tað kundi verið eitt skemtiligt listasøguligt poeng í hesari samanseting í stíl við “Mikines goes pop”, men er tað eftir øllum at døma ikki.

## Ein glotti

Sum heild er hendan framsýning enn eitt dømi um, at Listaskálin í sínum framsýningum raðfestir meira sum eitt privat gallarí í mun til hvat selir enn í mun til veruliga, listaliga góðsku. Hetta er skeivt, tí talan er um okkara tjóðarlistasavn, hvørs framsýningar eyðvitað hava stórt og tungt signalvirði. Hetta skuldi verið púra óneyðugt at gjørt vart við hjá tygara í grundini stríðsskýggjandi ummælara, sum ávegis út úr Listasavninum bar eyga við eina røð av nýggjum fotomyndum hjá Kára Svensson, sum hann hevur tikið av seyðarhøvdum. Við teirra líkskapi við kyrrlutamyndir í barokktíðini og við teirra átrúnaðarligu assosiatiónum sum heild, eru hesar myndirnar øðrvísi. Tær tykjast kanska eitt sindur ungdómsligar, men eru eisini merktar av einari inniligari, religiøsari leitan, ið kennist sum heild erligari og harvið eisini áhugaverdari enn málningarnir.

Framsýningin er opin til 8.mars. Bókin *Kári Svensson* fæst til keyps fyri 250 krónur. Upplatingartíðir o.a. sæst á www.art.fo